Radio.fo

Tórshavn, 20. januar 2021

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
FO-100 Tórshavn

Stílað: Aldu Joensen, fulltrúa

Hoyringssvar um miðlastuðul

Vit takka fyri møguleikan at geva hoyringssvar viðvíkjandi lógaruppskotinum um miðlastuðul, vísandi til skriv tykkara 4. januar 2021.

Radio.fo tók við á FM-sendinetinum eftir R7 á nýggjárinum. Hóast vit eru nýggj, eru vit landsdekkandi og landsfevnandi.

Landsdekkandi, tí vit á FM-sendinetinum røkka um alt landið til hvønn bý, hvørja bygd og einar 50 fjórðingar út á fiskileiðirnar.

Landsfevnandi, tí vit hava lagt okkum eftir at hava sendingar og beinleiðis samrøður úr øllum hornum í landinum. Tá ið vit tóku við á midnátt á nýggjarinum sendu vit beinleiðis úr Klaksvík, Saltangará, Tórshavn og úr Vági, umframt at vit eisini hava sendingar úr Vágum.

Soleiðis senda vit bæði til allar Føroyar og úr øllum Føroyum.

Hetta hevði tó ikki verið gjørligt uttan stóru vælvildina frá eldsálunum handan R7 og R2 Net.

Hesar eldsálirnar eru ein familja úr Søldarfirði, sum av einhvørjari orsøk fóru undir at byggja eitt landsdekkandi FM-sendinet, eftir at útvarps-monopolið tekniskt brotnaði síðst í 90'árunum.

Nú eldsálirnar valdu at takka fyri seg, standa vit í Radio.fo í teirra stað og royna at lyfta arvin, fóta okkum og fáa raksturin at bera seg.

Tá ið miðlastuðul er til viðgerðar, eru miðlalandslagið, kostnaðir og játtanir eisini til viðgerðar. Tí vilja vit lýsa tær verandi og vantandi fortreytirnar, ið vit sum ein landsdekkandi, privat útvarpsstøð hava at liva undir.

Vit kundu rokkið 50-60% av føroyingum við bert at sett eina sendistøð upp í miðstaðarøkinum, og hevði hetta nokk eisini loyst seg best fíggjarliga, tí vit liva av lýsingarinntøkum. Tó hava vit 16 sendistøðir, tí vit byggja á herðarnar hjá

Radio.fo

undangongufólkum, sum vildu lyfta uppgávuna at veita eitt landsdekkandi FM-net, hóast tey ikki høvdu álagda veitingarskyldu, sum t.d. KVF, SEV ella Føroya Tele.

Kostnaðurin av 16 FM-sendistøðum er sjálvsagt 16 ferð dýrari enn ein sendistøð fyri miðstaðarøkið, og higartil hevur lóggávan fyri miðlastuðul ikki tikið hædd fyri, at eitt landsdekkandi FM-sendinet er dýrt at dríva, meðan til dømis ein internetportalur bert hevur ein viðfáning av føstu útreiðslunum til sítt undirstøðukervið.

Uppskotið leggur upp til at broyta lógina, soleiðis at stuðulin til tíðindamiðlar verður býttur út eftir nýggjum leisti. Farið verður frá, at søkt verður um stuðul við útgangsstøði í lønarútreiðslum, til at miðlarnir kunnu søkja stuðul til ítøkiligar verkætlanir.

Vit hava nógvar ætlanir um sendingar, ið nokk kunnu verða fevndar av stuðli til verkætlanir, men tað er ikki heilt greitt, um vit kunnu søkja um stuðul til okkara føstu útreiðslur av undirstøðukervinum.

Okkara avbjóðing er í stuttum, at okkum tørvar 1 mió.kr. um árið til undirstøðukervið, sum er FM-sendinetið og tónleikarættindi hjá Koda og Gramex.

Í løtuni arbeiða vit ólønt fyri at vita, um vit fáa inntøkurnar at dekka føstu kostnaðirnar av undirstøðukervinum. Um hetta eydnast, fer tann næsta milliónin til at seta miðlafólk at veita dygdargott útvarp til lurtararnar.

So hvønn 1. januar síggja vit eina fíggjarætlan, har útreiðslurnar eru 2 mió.kr., og hetta holið mugu vit so arbeiða hart fyri at fylla við lýsingarinntøkum gjøgnum árið.

Til samanberingar kann nevnast, at Kringvarp Føroya hvønn 1. januar sær eina fíggjarætlan, har inntøkur á slakar 85 mió.kr., ið stava frá lógarásettum kringvarpsgjaldi v.m. (80,7 mió.kr.) og játtan á fíggjarlógini til sendinetið (4,2 mió.kr.). Avbjóðingin hjá teimum er ikki at útvega peningin, men at brúka hann gjøgnum árið.

Sostatt eru 87 mió.kr. á muni millum útgangsstøðið hjá Radio.fo og KVF hvørt ár, so tað sigur seg sjálvt, at miðlalandslagið er soleiðis háttað, at tað slítur upp privatar eldsálir.

Tá ið vit so hava spurt, um til ber at senda tilfar frá KVF, t.d. at samsenda tíðindir, so er okkara spurningur so mikið prinsippiellur, at vit, hálvan triðja mánað seinni, ikki enn hava fingið at vita, um vit kunnu at eta av molunum, ið detta av ríkamans borði.

Fyri at taka samanum, so er tørvur á nógv størri broytingum á miðlastuðulsøkinum, enn tað sum fyriliggjandi lógaruppskot ber í sær.

Radio.fo

Fyriliggjandi lógaruppskot um miðlastuðul kann møguliga verða ein bati, tí farið verður frá lønarendurrindan til stuðul til verkætlanir og sendirøðir. Spurningurin er so, um stuðulin tó framvegis bert verður til lønarútreiðlsur í sambandi við verkætlanir ella sendirøðir. Sum nevnt omanfyri hevur Radio.fo nærum einans fastar útreiðslur av sendineti v.m., og nærum ongar lønir í løtuni.

Okkara áheitan skal tí vera, at landsstýrið tekur alt miðlalandslagið upp til nýggja viðgerð, tí hóast monopolið varð brotið tekniskt fyri árum síðan, er monopolið framvegis nærum alvaldandi.

Avbjóðingin er at finna útav, hvussu privatu miðlarnir skulu hava samtíðistilveru (co-eksistera) og mennast undir liðini á almenna kringvarpinum.

Um tit eru áhugað at fáa nærri kunning ella hava spurningar eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum á tlf. 293900 ella við teldubrævi til radio@radio.fo

Vinarligar heilsanir

Jógvan Poulsen, Radio.fo